Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	03.11.2023
Mál nr.:	23/20829
Málsviðgjørt:	DH, BAB, JEK, JS, TM
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	25.10.2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju
(Skattaumskipan 2024 og 2025, hækking av brennioljugjaldinum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 179 frá 18. desember 1992 um serligt avgjald á brenniolju, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 141 frá 18. desember 2015, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Í 2024 verður eitt gjald upp á 0,80 kr. pr. ltr. lagt á søluna av gassolju, viskositet við 38 stig C undir 200 sec. Redwood I, til brúkaran. Vøran er nevnd í skjali 1, Toll- og vøruskráin, í løgtingslóg um toll undir vørunumrum 27101947 og 27101948 fýringsolja, 27101943 og 27101946 autodieselolja. Í 2025 og árini frameftir er gjaldið 1,00 kr. pr. ltr. Í 2024 verður somuleiðis eitt gjald upp á 0,90 kr. pr. ltr. lagt á søluna til brúkaran av brenniolju, fuelolju. Vøran er nevnd í skjali 1, Toll- og vøruskráin, í løgtingslóg um toll undir vørunumrum 27101964 og 27101968 brenniolja. Í 2025 og árini frameftir er gjaldið 1,15 kr. pr. ltr."

2. § 2, stk. 2-5 verða strikað.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Landsstýrið hevur gjørt av at seta í verk eina skattaumskipan, sum minkar inntøkuskattin. Tað skal loysa seg betur at arbeiða.

Síðstu nógvu árini er skattabyrðan flutt frá avgjøldum til inntøkuskatt.

Orsøkin er, at hvørki skattastigi ella avgjøld verða javnað við prís- ella lønarvøkstri. Avgjøldini eru í størstan mun ásett sum føst krónuupphædd fyri hvørja eind, meðan skattastigini í stigvaksandi skattaskipanini eru føst.

Frá 2016 til 2022 eru ongar broytingar av týdningi gjørdar í landsskatti ella søluavgjøldum og innflutningsavgjøldum.

Lønarvøkstur og ein skattastigi, sum ikki verður javnaður, gera, at inntøkurnar frá landsskatti eru vaksnar til um 2 mia. kr. í 2022, sum er ein vøkstur á út við 50 prosent síðani 2016, meðan avgjøldini eru óbroytt um 250 mió. kr. um árið.

Hetta er við til at trýsta føroyska arbeiðsmarknaðin, tí skatturin hækkar hjá teimum, sum arbeiða í Føroyum, meðan hann í veruleikanum minkar hjá teimum, sum arbeiða uttanlands og ikki rinda inntøkuskatt her í landinum.

Lógaruppskotið er liður í eini skattaumskipan, ið fevnir um hesi lógaruppskot:

- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um endurgjald til kommunur vegna frádráttir og serskattaskipanir (Skattaumskipan 2024 og 2025, tillaging av endurgjaldi til kommunurnar vegna stigvísa minking av fiskiveiðifrádráttinum og avtøka av uttanlandsfrádráttinum)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju (Skattaumskipan 2024 og 2025, hækking av brennioljugjaldinum)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi (Skattaumskipan 2024 og 2025, hækking av punktgjøldum á brennievni og broyting av heiti)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (Skattaumskipan 2024 og 2025, stigvís minking av fiskimannafrádráttinum og avtøka av samdøgursfrádráttinum og uttanlandsfrádráttinum)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin) (Skattaumskipan 2024 og 2025, javning av skattastiganum)

Lógaruppskot	Hvat	Fíggjarlig ávirkan 2024	Fíggjarlig ávirkan 2025	Fíggjarlig ávirkan 2026-2028	Samanlagt 2024 til 2028
Ásetingarlógin	Landsskattatalva - skattaumleggingin	100	100	0	200
Skattalógin	Broyting í frádráttum vm.	-13	-15	-25	-53
Serligt avgjald á brenniolju	hækking av avgjaldinum og strikan av afturbering	-50	-35	0	-85
Framleiðsla og innflutningi	F-gass, bensin og diesel avgjøld hækka	-37	0	0	-37
Samanlagt		**0**	**50**	**-25**	**25**

Talvan omanfyri lýsir ymisku lutirnar í skattaumskipanini 2024-28.Umframt inntøkur frá lógaruppskotunum í skattaumskipanini, koma 10 mió. kr. frá avgjøldum á f-gass. Sí uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi (Avgjøld á f-gass og ávísar rættingar í vørunumrum og øðrum).

Við hesum uppskotinum verða avgjøldini á brenniolju hækkað sum liður í fíggingini av skattaumskipanini.

Ein nærri greining av skattaumskipanini er í fylgiskjali 2, *Skattaumskipan 2024 og 2025*.

1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi lóggáva er løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 141 frá 18. desember 2015. Eftir galdandi lóg verður goldið 0,80 kr. pr. ltr. í brennioljugjaldi fyri gassolju (fýringsolja og diesel) og 0,10 kr. pr. ltr. í brennioljugjaldi fyri brenniolju (fuelolja, eisini nevnd tungolja).

Í dag fáa vinnufyritøkur á landi brennioljugjaldið endurrindað (sbrt. § 2, stk. 4), men fyri samfelagið er líka mikið, um útlát kemur frá vinnu ella húsarhaldum. Ætlanin er at strika skipanina við endurrindan fyri vinnufyritøkur á landi.

Í galdandi lóg (§ 2, stk. 1) er eisini undantak fyri skip yvir 20 GT. Ætlanin er ikki at broyta hetta í hesum umfari. Hetta er fyri ikki at eggja skipum at bunkra uttanlands.

Eftir galdandi lóg (§ 2, stk. 2) hava skip og bátar undir 20 GT, sum TAKS metir vera í vinnu og eru mvg-skrásettir, rætt til at fáa endurrindað brennioljugjaldið. Ætlanin er at strika hendan rættin at fáa brennioljugjaldið endurrindað.

Bjargingarbátar hjá sjálvbodnum bjargingarfeløgum, har øll arbeiðsmegin er sjálvboðin og ólønt, hava rætt til at fáa endurrindað brennioljugjaldið (sbrt. § 2, stk. 3). Ætlanin er at strika hendan rættin at fáa brennioljugjaldið endurrindað.

Ætlanin er harumframt at hækka avgjaldið á gassolju (fýringsolja og diesel) frá 0,80 kr. pr. ltr. til 1,00 kr. pr. ltr. frá 2025 og frameftir. Harumframt er ætlanin, at avgjaldið á tungolju verður hækkað frá 0,10 kr. pr. ltr. til 0,90 kr. pr. ltr. frá 2024 og til 1,15 kr. pr. ltr. frá 2025 og frameftir.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Lógaruppskotið er partur av skattaumskipanini 2024-25. Ætlanin er at hækka avgjøldini á brenniolju og at strika nakrar av møguleikunum fyri at fáa brennioljugjaldið endurrindað sum liður í fíggingini av skattalættanum. Endamálið við broytingunum er sostatt at fíggja ætlaða skattalættan frá 2024.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Broytingarnar eru, at avgjaldið á gassolju (fýringsolja og diesel) hækkar frá 0,80 kr. pr. ltr. frá 2024 til 1,00 kr. pr. ltr. frá 2025 og frameftir, umframt at avgjaldið á tungolju hækkar frá 0,10 kr. pr. ltr. í 2023 til 0,90 kr. pr. ltr. frá 2024 og til 1,15 kr. pr. ltr. frá 2025 og frameftir.

Møguleikarnir fyri at fáa brennioljugjaldið endurrindað sbrt. § 2, stk. 2-4, verða harafturat strikaðir. Hetta merkir, at skip og bátar undir 20 GT, sum TAKS metir vera í vinnu og eru mvg-skrásettir, bjargingarbátar hjá sjálvbodnum bjargingarfeløgum og vinnufyritøkur á landi, nevndar í § 2, stk. 4, missa møguleikarnar at fáa brennioljugjaldið endurrindað.

Harafturat verður heimildin í § 2, stk. 5 í galdandi løgtingslóg at áseta nærri reglur um, hvørji virki koma undir stk. 4 og um endurrindan av gjaldinum, strikað við hesum lógaruppskotinum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur ikki verið til hoyringar.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Fíggjarmálaráðið metir, at meirinntøkurnar av lógaruppskotinum fyri landið vera um 50 mió. kr. árliga frá 2024 og um 80 mió. kr. árliga frá 2025.

Hetta lógaruppskotið er partur av skattalættanum 2024-28. Ætlanin er at hækka avgjøldini á brenniolju sum liður í fíggingini av skattalættanum. Skattaumskipanin er fult fíggjað í 2024. Í 2025 er helvtin fíggjað, meðan restin verður fíggjað árini 2026-28. Harafturat eru hægri tilfeingisgjøld við til at fíggja skattaumskipanina í 2025 og frameftir.

Fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum fyri landið eru lýstar í talvuni niðanfyri.

Brennioljugjald

		Avgjald (kr. pr. ltr.)			Meirinntøka (mió. kr.)		
	mió. ltr.	verandi	2024	2025	2024	2025	íalt
Diesel	30	0,8	0,8	1	0	6	6
Fýringsolja	70	0,8	0,8	1	0	14	14
Endurrindan til vinnu	16	-0,8	0	0	14	0	14
Fuelolja (tungolja)	45	0,1	0,9	1,15	36	11	47
Tilsamans					50	31	81

Skattalættin verður fíggjaður við stigvíst at strika nakrar av serskipanunum á arbeiðsmarknaðinum og í skattaskipanini. Avgjøld á olju verða dagførd, javnað og stigvíst hækkað soleiðis, at rindað verður í størri mun fyri útlát av vakstrarhúsgassi.

Lógaruppskotið hevur ikki við sær fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur við sær minni umsiting av skipanini við brennioljugjaldi, tí skipanin við endurrindan av brennioljugjaldinum verður tikin av.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar við sær fyri vinnuna. Í dag fáa vinnufyritøkur á landi brennioljugjaldið endurrindað (sbrt. § 2, stk. 4). Ætlanin við uppskotinum er at strika skipanina við endurrindan fyri vinnufyritøkur á landi.

Eftir galdandi lóg (§ 2, stk. 2) hava skip og bátar undir 20 GT, sum TAKS metir vera í vinnu og eru mvg-skrásett, rætt til at fáa endurrindað brennioljugjaldið. Ætlanin við uppskotinum er eisini at strika hendan rættin at fáa brennioljugjaldið endurrindað.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Ein avleiðing av lógaruppskotinum er, at brennievni verður dýrari at keypa. Tað verður tískil mett, at lógaruppskotið fer at skunda undir eitt skifti til grøna orku, og at lógaruppskotið, sum frálíður, verður við til at minka um útlátið av vakstrarhúsgassi. Tað verður mett, at lógaruppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar við sær fyri nakað ávíst øki í landinum. Sambært lógaruppskotinum verður nakað dýrari at keypa brennievni til bilin, umframt at streymurin og gassolja vera nakað dýrari. Hetta verður galdandi í øllum landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri sjálvboðin bjargingarfeløg, har øll arbeiðsmegin er sjálvboðin og óløn. Bjargingarbátar hjá sjálvbodnum bjargingarfeløgum, har øll arbeiðsmegin er sjálvboðin og óløn, hava eftir galdandi lóg rætt til at fáa endurrindað brennioljugjaldið (sbrt. § 2, stk. 3). Ætlanin við uppskotinum er at strika hendan rættin at fáa brennioljugjaldið endurrindað.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Mett verður ikki, at millumtjóðasáttmálar eru á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður, at lógaruppskotið samsvarar við *Hoyvíkssáttmálan* (Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin), *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sambært anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sambært bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

2.9. Markaforðingar
Kendar markaforðingar eru ikki á økinum, sum lógaruppskotið fevnir um.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Avgjaldið á gassolju (fýringsolja og diesel) hækkar frá 0,80 kr. pr. ltr. í 2024 til 1,00 kr. pr. ltr. frá 2025 og frameftir. Avgjaldið á tungolju hækkar frá 0,10 kr. pr. ltr. í 2023 til 0,90 kr. pr. ltr. frá 2024 og til 1,15 kr. pr. ltr. frá 2025 og frameftir.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

Nevnast kann, at samstundis sum hendan løgtingslógin kemur í gildi, verður kunngerð nr. 23 frá 19. februar 2003 um endurgjald av serligum oljugjaldi sett úr gildi, tí heimildarásetingin verður strikað úr lógini.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Til nr. 1
Eftir broytingunum í nr. 1 hækkar avgjaldið á gassolju (fýringsolja og diesel) frá 0,80 kr. pr. ltr. í 2024 til 1,00 kr. pr. ltr. frá 2025 og frameftir. Avgjaldið á tungolju hækkar frá 0,10 kr. pr. ltr. í 2023 til 0,90 kr. pr. ltr. frá 2024 og til 1,15 kr. pr. ltr. frá 2025 og frameftir.

Til nr. 2
Eftir broytingunum í nr. 2 verða møguleikarnir fyri at fáa brennioljugjaldið endurrindað sbrt. § 2, stk. 2-4 strikaðir. Hetta merkir, at skip og bátar undir 20 GT, sum TAKS metir eru í vinnu og eru mvg-skrásettir, bjargingarbátar hjá sjálvbodnum bjargingarfeløgum og vinnufyritøkurnar á landi, nevndar í § 2, stk. 4, missa møguleikan at fáa brennioljugjaldið endurrindað.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Leggjast kann aftrat, at samstundis sum hendan løgtingslógin kemur í gildi, verður kunngerð nr. 23 frá 19. februar 2003 um endurgjald av serligum oljugjaldi sett úr gildi, tí heimildarásetingin verður strikað úr lógini.

Fíggjarmálaráðið, 03. november 2023

Ruth Vang
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Skattaumskipan 2024 og 2025